# Fredrik Joensen 90 ár

Týsdag 17. juni verður Frederik Joensen (Frederik úr Sandvík) 90 ár. Síðan krígslok hevur Frederik verið búsitandi suðuri í Vági. Har giftust hann við Elly Samuelsen sum verður 85 ár í august. Tey fingu 5 børn.

Stutt kan sigast um Frederik, at hann hevur verið ein av allar raskastu og fimastu monnum á sjógv so væl sum á landi.

Hann royndist sera væl sum maskinmaður, og ikki minni væl sum formaður á útrórðabátum. Hann hevur roynt bæði línubat, trolara og slupp. Altíð skilamaður og góður fiskimaður.

Tá hann ikki var burturstaddur, hevði Frederik sunnudagsskúlauppgávur í Frelsunarherinum í meira enn 47 ár. Serstaku evnini at greiða frá, gjørdi hann til ein sunnudagsskúlalærara sum nógvir vágbingar við áhuga hava lurtað eftir.



*Elly og Frederik Joensen*

Frederik og Elly hava altíð verið fyrikomandi hjún, serstøk evnir at verða góð við yngra ættarliðið.

Nú eru næstan øll á garðinum gjøgnum mong ár farin í Harrans hendur.

Vit takka tykkum fyri, at tit eru sum tit eru. Sjálvt um eygur og heilsan ikki er sum ynskiligt, vóna vit at hava tykkum millum okkum í mong ár.

Bestu heilsur og Harrans signing yvir komandi dagar.

**Ein vinur**

## Minningarorð um Per Hansen

# Per í Heimistovu - á Glyvrum

**føddur 31. mai 1947 · deyður 9. mai 2008**

Lítið vistu vit báðir, tá ið vit á heysti í fjør vældu um hegn á Glyvrafjalli, at tað bleiv so stokkut, til tú bleiv kallaður heim. Tað kom dátt við, at Per doyði mitt í sínum dagsverki á arbeiðsplássinum. Tað eru bert góð minnir, ið ein hevur eftir, tá ið ein kemur at hugsa um Per og tann vinsæla og tað trúfestið, ið sermerkti hann. Hann hevði eitt serstakt lyndi. Ein hoyrdi hann aldri tala niðursetandi og ei heldur taka lut í útspilling av øðrum.

Ein kundi heita á Per, um ein hevði hjálp fyri neyðini, so orðatakið: Betur ein vin nær enn ein bróðir langt burtur, kundi av sonnum sigast um Per. Um tað á nakran hátt bar til hjá honum og somuleiðis Herborg, konuni, at rætta eina hjálpandi hond, tá ið á stóð, so vóru tey fús at hjálpa, hóast tað er ein djúp gjógv millum húsini, so var ein trygg brúgv at fara um undir øllum umstøðum. Sum grannar - bæði hann og pápin - hava vit røkt haga og bø og hava vit mangan heitt á hvønn annan og hava havt eitt sera gott og fyrimyndarligt samstarv. Hvar ið grannar sita væl um sátt, er ein av teimum dýrgripum, sum ikki kunnu metast í tímiligum virði.



Eg minnist dagin væl, tá ið so at siga róp kom í, tá ið Mona og Tummas høvdu fingið ein son. Vit dreingirnir sigldu við bátum í Stórahyli úti á Gjómunnanum. Tað var ein fagur dagur, og vit steðgaðu øllum spæli og fóru niðan fyri at síggja henda lítla drong, men tað bar so ikki til sjálvandi. Hetta var líka sum ein ljósgeisli av lívi og trivnaði aftan á ein tiltiknan kavavetur, ið bar við sær eitt hitt størsta seyðafellið, ið menn kunnu minnast. Menn høvdu úr at gera at grava seyð úr skalvi og at lívbjarga á ymiskan hátt, har tað var atkomandi.

Góða Herborg og døtrarnar. Vit duga ikki at meta saknin, men eg veit, tit hava ta andaligu styrki at taka ímóti sakni og teimum tungu løtum, sum standast av einum so stórum missi. Ein skilir tað best, um ein sjálvur hevði verið úti fyri slíkum, men lívið má livast framvegis og tíðin grøðir og minnini um at hava havt ein góðan mann og pápa, vilja vera við til at breiða ljós yvir tíðina framyvir. Eg vil takka fyri góðan vinskap, ið vit hava havt saman og allar tær hugnaløtur, vit hava sitið heima hjá tykkum og okkum.

**Bestu heilsanir frá**
**Rasmus og Annu Glyvradal**

Lesið Sosialin - so eru tit við

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jana Jensen**, ættað av Hellunum, andaðist á Lágargarði í Havn mánadagin 9. juni, 96 ára gomul. Bønarhald verður á Lágargarði hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Janu kunnu lata Lágargarði eina gávu konta í peningastovni.

# Tøkk



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 100 ára føðingardegi mínum, takki eg hjartaliga.

**Blíðar heilsanir**
**Mourits Sørensen**

**Dagurin**
**14. juni. Rufinus**, deyður umleið ár 300. Rómverskur hermaður, sum saman við øðrum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

**15. juni. Valdimarsdagur**. Danski kongurin Valdemar Sigur vann í orrustuni við Reval í Estlandi 1219.

**16. juni. Tycho**. Í fjórðu ella fimtu øld var hann biskupur í Amatus á Kypros.

**Prógv**
Pauli Joensen, skipsførari, Sundsvegur, Tórshavn, hevur við Syddansk Universitet lokið prógv sum Master i transport og maritim management.

Gunnar Isfeld hevur fingið prógv á Universitetinum í Keypmannahavn sum kandidatur í søgu og religión.

Eyð Berg hevur tann 28/5 lokið prógv sum bachelor í sjúkrarøktarfrøði á H:S Sygeplejerskeuddannelsen í Keypmannahavn.

**Brúdleyp**
Leygardagin 14. juni kl. 14 giftast í sali Frelsunarhersins, Ingrid H. Petersen, Tórshavn og Marner Kjærbæk, Vági. Veitsla verður fyri innbodnum á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin kl. 19.

**Silvurbrúdleyp**
14. juni hava Birgit og Gunnar Nattestad í Miðvági silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í heiminum á Hornavegi 5, har øll eru hjartaliga vælkomin til morgunmat frá kl. 9 til 14.